


Haldið Sosialin

... tí góð bløð hanga ikki á trøunum

TÝSDAG
MIKUDAG
HÓSDAG
FRÍGGJADAG
LEYGARDAG

Sosialurin er lættur at tryggja sær.

Tekna eitt hald fyri einans **400,- KR. UM ÁRSFJÓRÐINGIN**
og spar 380,- kr. ella 47% í mun til at keypa hann í leysasølu.
(600 kr. um ársfjórðingin í Danmark - ella 500,- kr. fyri 5 bløð 1 ferð um vikuna)

Um tú frammanundan er haldari, kanst tú harafturat halda
Internet-Sosialin fyri einans 120,- kr. um ársfjórðingin.

Ja!

Eg tekni meg sum haldara av Sosialinum og gleði meg til at fáa blaðið 5 ferðir um vikuna fyri 400,- kr. um ársfjórðingin.

Navn:

Bústaður:

Postnr./Bygd/Býur:

Telefonnummar:

Undirskrift:

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið
**64**

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

SISERO 31800


# ítróttur

Nr. 71 • fríggjadagur • 11. apríl 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dagsformurin avgerandi



*- Hetta er jú størsti dysturin á árinum, og sjálvur haldi eg tað vera fantastiska stuttligt, at kappingarárið skal enda so, heldur Bent Djurhuus, nú seinastu fyrireikingarnar til gullfinaluna skulu fáast frá hondini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**- Tað er fyrst og fremst í verjupartinum, at vit kunnu vinna dystin, men tað verður betra liðið á degnum, sum vinnur, heldur Bent Djurhuus um brakið í Vestmanna**

GULLDYSTUR
*Jákup Mørk*

Sum nevnt aðrastaðni í blaðnum, so tóktist tað ikki, sum um intensiteturin í næst seinastu venjingini hjá strandingum var heilt so høgur, sum roknast kundi við. Til tíðir var venjingin eina mest merkt av lótum frá summum av leikarunum.

Eftir venjingini hittu vit ein av leikarunum, Bent Djurhuus, og hóast hann ásannaði, at hetta ikki hevði verið harðasta venjingin á árinum, so bar hann ongan ótta fyri, leikararnir ikki vóru uppsettir.

- Ja. Fepurin í leikarunum er ikki ordiliga komin enn, men tað skal nokk koma. Hjá áskoðarunum er kanska heldur øðrvísi. Eg haldi at eingin hevur tosað um annað enn hondbólt alla vikuna, men vit mugu bara royna at taka tað meira róligt.

- Nú hava vit eina venjing eftir, og hóast hon neyvan verður av teimum harðastu, so eri eg ikki í iva um, at vit verða uppsettir. Hetta er jú størsti dysturin á árinum, og sjálvur haldi eg tað vera fantastiska stuttligt, at kappingarárið skal enda so. Tað ger tað til eina sanna finalu, og so er tað bara upp til okkum at taka av. Og tað ivist eg ikki í, at vit gera, heldur Bent.

- Kynstrið hjá okkum verður kanska heldur hinvegin at halda høvdi kalt, so vit ikki gerast ovurspentir. Tað kann vera oyðileggjandi fyri byrjanina av dystinum, men tá so fyrstu minuttirnir eru farnir, ivist eg ikki í, at allir slíkir tankar eru burturi. Tá snýr tað seg bara um at vinna dystin.

### Verjan skal rigga

Og spurdur, hvat hann heldur er uppskriftin til ein sigur á VÍF, er Bent ikki í iva.

- Vit skulu hava verjuna at rigga. Tað er so sera einfalt. Uttan eina góða verju hava vit ongan møguleika at spæla kontra-spælið, sum er hitt besta vápnið hjá okkum, so verjan er í so máta fortreytin.

- Og so ræður eisini um at lurta eftir tí, sum Sveinbjørn altíð sigur. Tá møguleikarnir fyri kontra ikki eru til staðar, so ræður um at hava tol og breidd í spælinum, so vit ikki fremja nøkur óneyðug mistøk.

- Men tá hetta er sagt, so skal eisini leggjast afturat, at tað ber illa til at rokna seg fram til, hvussu dysturin skal vinnast. Tað verður dagsformurin, sum verður avgerandi, og so mugu vit bara syrgja fyri at hava ein góðan dag, sigur Bent Djurhuus at enda.

## Seinastu fyrireikingarnar

**StÍF skal leygardagin spæla gullfinalu í Vestmanna. Ein dystur, sum í sjálvum sær einsamallur ger av, hvat av liðunum fær gullmerkini um hálsin. Mikukvøldið vitjaðu vit næst seianstu venjingina hjá StÍF**

GULLDYSTUR
*Jákup Mørk*

Tað er heldur friðarligt í ítróttarhøllini á Skála. Bert tríggir dagar eru eftir, til stórsti dysturin á árinum skal byrja, men hetta tykist ikki nerva leikararnar, nú næst seinasta venjingin er á skránni. Undir upphitingini snýr prátið seg heldur um dystin millum Real Madrid og Manchester United, og tað er ikki við mýkindum, at viðmerkingarnar fúka gjøgnum luftina til teir av leikarunum, sum hava kastað sín alsk á enska felagið. Viðmerkingar sum tó verða aftursvaraðar við atfinningum at, hvussu vánaligt okkurt fyrrverandi enskt stórfelag nú er, og soleiðis gongur prátið fyrstu nógvu minuttirnar.

### Ongantíð í topp

Spakuliga kemur tó meira intensitetur í. Málverjarnir verða eisini upphitaðir, og tá Costin Dumitrescu síðani setur nøkur interval-spøl ígongd, fer pulsurin av álvara upp hjá teimum flestu.

Tað tykist tó sum um sleppur álvarin, sum annars átti at valdð, ongan tíð at koma fram. Venjingin verður sum vant endað við spæli millum tvey lið. Teir uttan vest tykjast kanska vera teir, sum eru nærri einum plássi í sonevndu ideal-uppstillingini, men tað merkir tó ikki, at teir fáa lætt spæl kortini. Í eini rótutari uppgerð vinna teir kortini við einum einstakum máli, og so er venjingin fyri kvøldið mest sum liðug.

Onkrar skotvenjingar verða gjørdar afturat, og nakrir av leikarunum sita eftir. Prátandi og skemtandi, men tað er einki at ivast í, at skemtingarlagið onkursvegna er við til at krógva tann spenning, sum nú býr í.

Bert ein venjing fríggjakvøldið, og so dysturin leygardagin. Tann seinasti í hesum kappingarárinum og samstundis tann mest avgerandi. Undan hesum hava teir í 23 dystum syrgt fyri útgangsstøðinum, sum teir nú hava vunnið sær, men enn restar seinasti bitin. Krúnan, sum setir punktum fyri einum góðum kappingarári, og tað verður hesari, sum farið verður eftir leygardagin.



*Fyri tað mesta gekk venjingin róliga fyri seg, men einki er at ivast í, at leikararnir kortini vera púrasta klárir leygardagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*